Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting: 15. juli 2025
Mál nr.: 25/19981
Málsviðgjørt: OYS

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 29. mai 2024 og løgtingslóg nr. 62 frá 28. apríl 2025, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri, at partar av skúlabygningunum á Frælsinum verða høvuðsumvældir og umbygdir. Byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 39 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv, umframt útreiðslur til at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum. *Stk. 2.* Landsstýrismanninum verður eisini heimilað at prosjektera heildarætlanina fyri skúlabygningarnar á Frælsinum fyri í mesta lagi 7,3 mió. kr.	**1.** Í § 1, stk. 1, 1. pkt. og stk. 2 verður "Landsstýrismanninum" broytt til: "Landsstýrisfólkinum". **2.** Í § 1 verður sum stk. 3 sett: "*Stk. 3.* Landsstýrisfólkinum verður eisini heimilað at halda útreiðslur til víðari at prosjektera næsta byggistig í skúlabygningunum á Frælsinum fram til útboð. Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 14,5 mió. kr."